# Politiskar samráðingar um løgreglu nærkast

Samgonguskjalið ásetir, at arbeiðast skal víðari við at fyrireika yvirtøku av løgreglu og dómsvaldi. Yvirtøkan er ikki ásett at vera í hesum samgonguskeiði, men kortini kunnu politisku samráðingarnar helst takast upp í næstum. Fríggjadagin verður fundur í donsku-føroysku embætisnevndini, sum skal gera tað fyrireikandi arbeiði, ið skal vera grundarlagið undir yvirtøkuni. Arbeiðið gongur væl, og eftir øllum at døma kann eitt politiskt samráðingarumfar verða í vár, upplýsir Rúni Joensen fyri Útvarpi Føroya.

Tá tveir fundir hava verið afturat er ætlanin at gera eina felags niðurstøðu. Nevndin arbeiðir við at greina út, hvussu málsøki kann yvirtkast, og hvussu tað kann skipast, tá tað verður yvirtikið. Føroysku og donsku embætismenninir lýsa hvør síni øki.

**-ir**

# Sólja verður aðalstjóri



*Sólja í Ólavsstovu, aðalstjóri*

Sólja í Ólavsstovu, sum í løtuni er virkandi forstjóri í grønlendska heimastýrinum er sett í starv sum aðalstjóri fyri Almannaráðið.

Sólja er 43 ára gomul og útbúgvin løgfrøðingur. Síðstu trý árini hevur hon starvast í løgdeildini hjá grønlendska heimastýrinum. Harafturat hevur hon verið stjóri í landsstýrisskrivsstovuni og samstundis verið varastjóri í grønlendska heimastýrinum í umleið seks ár. Áðrenn Sólja fór til Grønlands, var hon eftir lokna útbúgving tvey ár í Landsskúlafyrisitingini og stjórnarskrivari í Føroya banka í eitt ár.

**-ir**

# Strangari eftirlit við politiskari upplýsing



*Valstríð eru fíggjað við stuðli til politiska upplýsing, sum eisini fevnir um rakstur av politiskum flokki, útgávu av bløðum, skeið- og fundarvirksemi og kanningar*

**Teir stóru fáa minni, og teir smáu fáa meira. Tað er avleiðingin av nýggju skipanini við politisku upplýsingini. Nýggja lógin ger eftirlitið við almennu skattakrónunum til politiska upplýsing nógv strangari. Flokkarnir skulu frameftir lata inn roknskap, sum skjalprógvar, hvagar peningurin fer**

POLITISK UPPLÝSING
*Ingi Rasmussen*

Mest sum onki eftirlit er við, hvussu politisku flokkarnir brúka pengarnar til politiska upplýsing, sum skattgjaldarin rindar. Einasta kravið hevur verið, at politisku flokkarnir hvør sær undirskriva eitt skjal, har teir í einari reglu vátta, at peningurin er nýttur til endamálið.

Ongin roknskapur, onki yvirlit og ongin trygd fyri, at pengarnir veruliga eru brúktir til at styrkja politiska arbeiðið og politiska upplýsing, sum lógin tilskilar.

Tað verður nú bøtt um.

## Hert eftirlit

Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, sum umsitur politiska stuðulin til flokkarnar, hevur lagt eitt uppskot fyri løgtingið, sum herðir eftirlitið við politisku upplýsingini.

Frameftir skal tann, sum fær stuðul, í seinasta lagi 1. apríl á hvørjum ári senda landsstýrismanninum roknskap fyri undanfarna roknskaparár, sum fevnir um alt virksemi hjá flokkinum. Skrásettur grannskoðari skal hava grannskoðað roknskapin, sum skal hava grannskoðaraátekning um, hvørt roknskapurin er í samsvari við góðan roknskaparsið. Lagt verður afturat, at stuðul, sum er fingin av órøttum, ella ikki er nýttur til endamálið, skal gjaldast aftur.

Hetta eru nýggir tónar um stuðulin til politiska upplýsing, sum ivi ofta hevur verið sáddur um. Eitt nú landsgrannskoðarin hevur átalað, at so lítil krøv hava verið sett til eftirlitið við, hvat peningurin verður nýttur til.

## Meira til teir smáu

Broytingarnar í skipanini hóvar ikki teimum stóru andstøðuflokkunum serliga væl, og tí er spurningurin, um nýggja lógin sleppur óskalað gjøgnum løgtingið. Skipanin verður nevniliga broytt soleiðis, at smáu flokkarnir fáa lutvíst meira í sín part enn teir stóru.

Tilsamans 2,7 milliónir krónur verða árliga rindaðar á fíggjarlógini til politiska upplýsing. Higartil hevur skipanin virkað soleiðis, at flokkarnir fáa útgjald lutvíst eftir tingmannatali. Frameftir fáa allir flokkar fyrst eitt grundgjald og hareftir ein lutvísan part eftir stødd. 30 prosent av upphæddini, sum er 65.000 krónur hvør, verða býtt javnt millum flokkarnar uttan mun til stødd. Síðan verður restin býtt lutfalsliga eftir atkvøðatali við seinasta val.

## Ósemja um býti

Broytingin ger, at eitt nú Sambandsflokkurin við 8 tingmonnum fer úr 712.834 krónum um árið niður í 626.984 krónur. Hinvegin fer Miðflokkurin, sum telur ein tingmann, úr 114.164 krónum upp í 214.915 krónur um árið.

Stóru andstøðuflokkarnir hava ført fram, at nýggja býtið er óheppið fyri demokratiið, tí andstøðan hevur ikki ta somu orkuna at viðgera mál og uppskot sum samgongan, ið hevur alla miðfyrisitingina aftan fyri seg.

Orsøkin til ætlanina at styrkja smærru flokkarnar er, at stóru flokkarnir hava nakrar stórrakstrarfyrimunir, sigur Høgni Hoydal landsstýrismaður. Herdu umsitingarkrøvini áleggja øllum flokkum útreiðslur, sum í grundregluni eru eins, óansæð hvussu stórur flokkurin er, og hesum er neyðugt at viga upp ímóti, heldur hann.

Løgtingið viðgjørdi uppskotið um politiska upplýsing á fyrsta sinni mikudagin.

### Fakta

Árligur stuðul áðrenn og eftir broytingar:

| | | |
|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | (561.278 kr) | 527.894 kr |
| Sambandsflokkurin | (702.834 kr) | 626.984 kr |
| Javnaðarflokkurin | (563.575 kr) | 529.503 kr |
| Sjálvstýrisflokkurin | (119.378 kr) | 218.564 kr |
| Tjóðveldisflokkurin | (638.771 kr) | 582.140 kr |
| Miðflokkurin | (114.164 kr) | 214.915 kr |



# Fólkaskúlin er sum eitt risa tangaskip

**Mentamálaráðið hevur givið út ritið Sús, sum merkir skoðanir úr skúlanum. Tólv fólk hava skrivað greinir til ritið, og har verður nomið við bæði námsfrøði, lønmóttakarar og skúlan, sum eitt skip, ið er ringt at venda. Eisini ætlar landsstýriskvinnan í næstum at práta við lærarar kring alt landið**

FÓLKASKÚLIN
*Theodor E. D. Olsen*



*27. januar byrjar Annlis Bjarkhamar sína ferð kring landið, har hon ætlar sær at lurta eftir skúlafólki. Hon hevur sjálv skrivað fororðið í nýggja ritinum »Sús«. Hinir høvundarnir, sum greiða frá »skoðanum úr skúlanum«, eru Mariann Mortensen, Rógvi Thomsen, Karin Hammer, Elin Henriksen, Jan Mortensen, Marni Tyril, Pálin Olsen, Kári P. Højgaard, Jón Hammer, Jóhannes Miðskarð, Kim Simonsen og Heðin Mortensen*

Mentamálaráðið hevur givið út ritið Sús, sum er stytting fyri orðingina »Skoðanir úr skúlanum«.

Í næstum byrjar landsstýriskvinnan við undirvísingarmálum eina rundferð í Føroyum, har hon sigur seg vilja hitta skúlafólk og lata tey siga sær sína hugsan. Eins og hetta nýggja ritið sigur seg vera málgagn hjá røddum úr tí føroyska fólkaskúlanum, so ætlar Annlis Bjarkhamar sær nevniliga at fara út úr bygningunum hjá Mentamálaráðnum á Hoyvíksvegi í Havn og fara út at hitta tann partin av skúlanum, sum eita lærarar. Tó er ein næmingur í framhaldsdeildini sloppin upp í part í ritinum Sús. Saman við fýra lærarum, fýra lesandi, einum vinnuumboði, tveimum politikarum, sum ikki hava fortíð sum lærarar, umframt einum tólvta høvundi, ið er cand. phil., sleppur hesin næmingurin at siga sína hugsan um tann føroyska fólkaskúlan.

Sjálv sigur Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinna í fororðinum í tí nýggja ritinum: »Úr ymiskum sjónarhornum verður ljós varpað á framtíðar fólkaskúla okkara.

Tað er eyðsæð, at tær umfatandi broytingarnar, vit uppliva í okkara parti av heiminum, geva lærarunum og skúlanum nýggjar uppgávur og nýggjar treytir«. Og landsstýriskvinnan heldur fram við at siga: »Ein og hvør menning og tær broytingar, hon førir við sær, mugu hava festi og spretta úr teimum, sum dagliga starvast í fólkaskúlanum. Tí tað er í dagliga stríðnum, at mørk verða flutt, nýggjar hugsanir føddar og ótroddar leiðir gingnar.

Ætlanin er tí, at allir lærarar næstu vikurnar fáa møguleika at koma til orðanna við teirra hugskotum og góðu ráðum, nú setast skal út í kortið, hvør kósin hjá fólkaskúlanum skal verða komandi árini«.

## Skúlin og management

Sum nevnt hevur Mentamálaráðið heitt á 12 fólk at skriva teirra hugsan um tann føroyska fólkaskúlanum, og av tí at bakgrundirnar og fortreytirnar eru ymiskar hjá høvundunum eru ymiskar, verður hetta stóra evnið skoðað av ymiskum sýnum í tí nýggja ritinum hjá Mentamálaráðnum. Eitt nú skrivar Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum: »Bara at nevna f r e m m a n d a o r ð i ð »management« í mun til fólkaskúlan, kann tykjast møtimikið. Fólkaskúlin er næstan sum eitt risa tangaskip, og tað tekur tíð at venda. Tað tekur langa tíð at seta nýggja lóggávu og ætlanir í verk. Men tørvur er á at gera hann meira førligan.

Ein trupulleiki er ivaleyst, at leiðsla søguliga altíð hevur verið eitt »fremmant« orð innan fólkaskúlan. Annaðhvørt ynskja lærararnir ikki leiðslu ella halda, at leiðsla er óneyðugt fyri virksemið í skúlanum. Tí hava leiðsluspurningar og management ikki verið í brennideplinum innan fólkaskúlan.

Og hetta darvar fólkaskúlan, eins og tað vildi darvað eitthvørt virki – privat ella alment. Tí virkisleiðsla í dag er í stóran mun ein spurningur um at eggja og menna starvsfólk bæði fakliga og menniskjaliga«.

## Samfelagið brúk fyri trælum

Eitt annað ískoyti til Sús hevur Kim Simonsen skrivað: »Ongastaðni í samfelagnum síggja vit betur goymda valdið enn í skúlaverkinum. Frá fólkaskúla til miðnámsskúlar og til lærdar háskúlar kann ein síggja »disiplinering« av einstaklinginum. Mangan eru tað tey, sum skjótast boyggja seg, sum lærarum dámar best og geva viðmæli.

Á ein hátt er menniskjað óendaliga gávuríkt, meðan skúlarnir skerja veingirnar hjá hesum pisum, tí samfelagið hevur brúk fyri »trælum«, lýdnum borgarum. Børnini verða í skúlanum uppdrigin til at gerast lønmóttakarar. Skúlin setir at enda spjaldur á og sigur, um tú ert »egnaður« ella »ikki egnaður« til meira skúla.«

Eitt annað brot, sum snýr seg um framtíðarskúlan, hevur Elin Henriksen skrivað: »Samanumtikið má sigast, at meðan kravið til skúlan fyrr fyrst og fremst var at geva børnunum høvi at nema ávísan kunnleika og førleika á avmarkaðum økjum, serliga teimum bókligu, so er hetta ikki longur nóg mikið. Avbóðingin til framtíðarskúlan er, at hann má hava barnalívið sum heild fyri eygað. Skúlin má geva rúm fyri at menna allar síður hjá barninum. Líka nógvur sentur má leggjast á ta sosialu, kensluligu, handaligu, listarligu og kropsligu menningina sum á vanligan skúlalærdóm sum mál støddfrøði, søgu, kristni og náttúrulærugreinirnar. Skúlin má eisini í alt størri mun átaka sær at læra børnini at skyna á lívsvirðum og at finna sína støðu til etiskar og moralskar spurningar. Somuleiðis er tað eisini ein uppgáva hjá skúlanum at læra næmingarnar at vera vandnarí kunningar- og undirhaldsfloyminum, sum fjølmiðlarnir næstan drukna okkum í«.

Sum nevnt er eitt av hesum tólv fólkunum, sum hava skrivað í Sús, sjálvt næmingur í dag, og er tað Mariann Mortensen. Hon skrivar: »Til seinast vil eg siga, at skúlin ger alt ov lítið burturúr at fáa fólk uttanífrá at vitja í skúlan. Skúlin hevur eina heilsusjúkrasystur, ið tekur sær av tí heilsuliga hjá næmingunum, hon kundi t.d. eisini skipað fyri, at vit fingu vitjan av einum kostráðgeva, ella onkrum frá fyribyrgingarráðnum. Hetta hava næmingarnir nógv brúk fyri at vita, og eg haldi eisini, at teir høvdu lurtað nógv betur eftir einum uttanífrá, enn eftir foreldrum og lærarum«.

## Rundferðin hjá Annlis Bjarkhamar

**Suðuroy**
Skúlin í Trongisvági mánadagin 27. januar 2003 kl. 13.00
Luttakarar: Sandvíkar Skúli, Hvalbiar Skúli, Tvøroyrar Skúli, Fámjins Skúli, Porkeris Skúli, Hovs Skúli, Vágs Skúli, Skúlin á Leiti og Sumbiar Skúli

**Sandoy**
Sandoyar Meginskúli hósdagin 30 januar 2003 kl. 9.00
Luttakarar: Skopunar Skúli, Sands Skúli, Sandoyar Meginskúli, Skálavíkar Skúli, Húsavíkar/Dals Skúli og Skúvoyar Skúli

**Norðoyggjar**
Skúlin við Ósánna fríggjadagin 31. januar 2003 kl. 13.00
Luttakarar: Skúlin við Ósánna, Skúlin á Ziskarøð, Haraldsunds Skúli, Kunoyar Skúli, Mikladals/-Trøllanes Skúli, Húsa/Syðradals Skúli, Skúlin á Fossánesi, Viðareiðis Skúli, Svínoyar Skúli og Fugloyar Skúli

**Eysturoy**
Felagsskúlin á Oyrarbakka mánadagin 3. februar 2003 kl. 9.00
Luttakarar: Hósvíkar Skúli, Hvalvíkar Skúli, Haldórsvíkar Skúli, Tjørnuvíkar Skúli, Norðskála/-Oyrar Skúli, Felagsskúlin á Oyrarbakka, Eiðis Skúli, Gjáar Skúli, Funnings Skúli og Funningsfjarðar Skúli

**Tórshavn**
Samkomuhøllin í Venjingarskúlanum mánadagin 3. februar 2003 kl. 13.00
Luttakarar: Argja Skúli, Venjingarskúlin, Tórshavnar Kommunuskúli, Sankta Frans Skúli, Eystur-skúlin, Hoyvíkar Skúli, Kaldbaks Skúli, Kollafjarðar Skúli, Velbastaðar Skúli, Hests Skúli, Nólsoyar Skúli, Adventistaskúlin og Skúlin á Sernámsdeplinum

**Eysturoy**
Fimleikarhøllin á Gkyvrum hósdagin 6. februar 2003 kl. 13.00
Luttakarar: Oyndarfjarðar Skúli, Skála Skúli, Stranda Skúli, Tofta Skúli, Runavíkar Kommunuskúli, Gøtu Skúli, Leirvíkar Skúli og Fuglfjarðar Skúli

**Vestmanna**
Vestmanna Skúli fríggjadagin 7. februar 2003 kl. 9.00
Luttakarar: Vestmanna Skúli, Kvívíkar Skúli og Leyna/Vála Skúli

**Vágar**
Skúlin á Giljanesi mikudagin 12. februar 2003 kl. 9.00
Luttakarar: Miðvágs/Sandavágs Skúli og Sørvágs Skúli